

VIÐ ÓLA JACOBSEN

# Hendur ið sleptu: Óli Mortensen bygdi Færøstuen á Frilandsmuseet

POULINA ÚR VESTMANNA HEVÐI MIST ØLL SÍNI OG MÁTTI JARÐAST Í HAVN. VIT HAVA NÝGGJAR FRÁSAGNIR AV SVÍNARYGGI. EISINI UM OLE MORTENSEN, SUM BYGDI LAND SUM NAKAR



*Ole Mortensen*



*Her liggja tey bæði grivin*



*Avhaldshúsið, ein miðdepil í Havn í síni tíð.*

Tað var í 2007, at Sosialurin byrjaði røðina "Hendur ið Sleptu", sum var ein lýsing av søguni hjá teimum, sum lógu undir gravsteinunum í gamla kirkjugarðinum á Svínaryggi. Í einstøkum førum vóru eisini lýstar gravir uttan stein, har vit vistu, hvør ið var jarðaður har. Hetta var eitt stórt arbeiði, eisini tí at nógvir av steinunum eru ringir at lesa. Men higartil er eydnast at lesa innskriftina á øllum steinum uttan einum.

Saman við Tórshavnar kommunu verður nú skipað fyri at gera allar steinar við teirra søgu atkomiligar á einum skermi. Í hesum sambandi er komið fram á fleiri nýggjar steinar, har tað er eydnast at staðfesta nøvnini. Hetta eru øll nøvn, sum eru partur av Havnar og Føroya søgu.

Henda grein fer at snúgva seg um tvær av hesum gravum. Seinni koma greinir um hinar gravirnar.

Í hesi verkætlan verða umrøddir gott 300 gravsteinar, og á teimum eru eini 500 nøvn. Hesi hava sjálvandi nógv fleiri avvarandi.

Hetta merkir, at nógvar ættir bæði í Havn og aðra staðni frá í Føroyum verða umrøddar.

Annars verður á mentanarnáttina tann 4. juni skipað fyri rundferð í kirkjugarðinum kl. 16,30, har greitt verður frá nøkrum av teimum áhugaverdu lagnunum, sum eru í kirkjugarðinum. Fleiri av teimum hava slóðir langt út í heim, so langt sum til New Zealand.

## Ole Mortensen – virkin maður á fleiri økjum

Óli hevur ongan beinleiðis gravstein. Men hann og kona hansara, Johanna, hava tó steinar við nummari á grøvini. Tí ber til í protokollini fyri kirkjugarðin at finna fram til tey.

Pàpi Óla, Mortan Andrasson, var sonur Elspu og Andrass, sum bygdu Argir síni tíð. Mortan giftist tvær ferðir. Fyrru ferð við Elisabeth Jógvansdóttir og seinnu ferð við Jóhonnu Elisabeth Jákupsdóttur av Húsum í Havn.

Samsystkini hjá Óla vóru:

Jákup (á Skølti) f. 1848, sum giftist við Marin úr Dali í Havn

Dánjal Pauli (Gamli Palli) f. 1854. Hann var abbi Sverra Rasmussen á Argjum sum doyði fyri kortum. Palli er fyrr umrøddur í røðini Hendur ið sleptu.

Sjálvur giftist Óli við Ellu Johonnu úti á Reyni í Havn. Børn teirra vóru Thomas Juel, Sofus, Johanne Elisabeth g. Jacobsen, Morten, Ellen Marie og Jens Wenningsted.

Palli Gregoriussen greiðir í bókini Palli frá:

Tað serliga húsið niðast í Bøgøtu var húsið hjá Tummas Juel. Hann var blikksmiðjur og arbeiddi fyri fyritøkuna Ludvig Poulsen, nú Maria Poulsen. Beiggi hansara, Mortan, var meistari har. Hákun, vinmaður mín, sonur Tummas Juel, lærdi til blikksmið í tí smiðjuni.

Húsið var seks ferður tíggju alin við grund við kjallara og eini miðhædd og so eini yvirtrom við triðingsreising. Fínt og vakurt hús. Men har var trongt inni, og alt skuldi ganga sum eftir einum snóri. Dreingirnir vóru meira ella minni vaksnir, so har skuldi vera døgurði klárur hvønn dag klokkan 12, men tey vóru øgiliga røsk, og tað gekk væl hjá teimum í allar mátar.

Men so hendi hendan vanlukkan. Pápin, Tummas Juel, fekk eina heilatilburð niðri á verkstaðnum og varð borin heim og so út á hospitalið. Har doyði hann sama dag. Hetta hevur verið í 1944 og var ein dyggur smeitur fyri tey. Eg minnist, at Hákun hevði tað ringt tann dagin, at pápin skuldi fara soleiðis.

## Virkin á nógvum økjum

Óli var ein ógvuliga virkin persónur og var við í nógvum. Hann var ein stigtakari til at byggja táverandi meinigheitshúsið, nú býráðssalur í Havn. Hann var eisini við í bygginevndini. Tað var í 1895 at fyrsta stig var tikið til at byggja húsið. Tað var liðugt í 1896.

Meinigheitshúsið hevur alla sína tíð havt stóran týdning fyri andaliga lívið í Havn. Johannes Andr. Næs hevur skrivað drúgva bók um Meinigheitshúsið.

Óli var eisini við til at stovna Havnar Sjúkrakassa í 1887. Tað var tað táverandi Thorhavns Arbejderforening, sum saman við Thorshavns Totalafholdsforening í 1886 tóku stig at stovna ein sjúkrakassa. Hesi feløgini mannaðu ta nevnd, sum saman við øðrum fyrireikaðu stovnanina.

Tá ið so sjúkrakassin varð stovnaður kom Óli í nevndin. Har sat hann fram til 1897, tá hann legði frá sær sum ein av teimum seinastu av fyrstu nevndini.

Í fyrstu nevndini var hann saman við Djóna í Geil, Rasmus Effersøe, H.C. Olsen og Jacob Lützen. Sjúkrakassin hevur verið eitt ómetaliga stórt framstig tá í tíðini, serliga fyri tey sum vóru ringast fyri. Tað er áhugavert, at gamla avhaldsfelagið var partur í hesum.

## Bygdi føroyska húsið á danska Frilandssavninum

Óli fór ungur at arbeiða sum sjálvstøðugur byggi- og timburmeistari. Tað var hann, sum í 1908 smíðaði føroyska húsið á Frilandsmuseet í Lyngby, kallað Færøstuen.

Tann 22. august 1928 var ein stubbi í Dimmalætting um hesi húsini, har tað m.a. varð sagt av einum ferðandi:

"Í Lyngby er eitt stórt landbúnaðarmuseum, og ein deild av tí er tað sokallaða Frilandmuseum, hvar tað hús er at síggja, sum er avmyndað í hesi grein. Hetta hús varð smíðað av Ole Mortensen, Tórshavn, fyri umleið 20 árum síðani, og tað er frálíka væl úr hondum greitt. Sum myndin vísir, er tað gjørt eins og tey hugnaligu føroysku bóndahúsini, ið hóska so væl til tað føroyska landslagið.

Eg var í gjár saman við einum landsmanni úti í Lyngby fyri at vitja tað føroyska húsið ella Færøstuen, sum tað verður nevnt.

Tá ein kemur inn í hoygarðin, ið er frammanfyri tað føroyska húsið, kennir ein seg eins og heima í Føroyum, og henda kensla verður ikki minni, tá ið ein kemur inn í fjós, roykstovu og glasstovu.

Í fjósinum finnast seks básar, og har eru líggjar, rívur, hakar og torvskerar, leypar, kvørn, snøri o.a.

Í roykstovuni eru grúgva, kola, ymisk íløt, krakkar av stórhvalageislum, hampasnældur og ikki at gloyma tann gamli føroyski vevurin, ið er uppsettur, soleiðis sum hann eigur at vera.



*"Førøstuen" hjá Óla Mortensen. Í 1960-unum varð hon avloyst av Múlahúsinum.*

Í fjósinum og roykstovuni er moldgólv. Glasstovan hevur trægólv, og á bróstinum, sum ikki er tapetserað, hanga ymisk gomul bíløt. Her er at síggja ein gomul og sera vøkur dragukista, ein borðbátur, tvey talvborð við fólki, sum er gjørt í Føroyum og annað. Í glasstovuni eins og í roykstovuni eru koyggjusengur og annars alt, ið hoyrir til.

### Var við til at smíða spedalskahospital í Íslandi

Tann 1. oktober 1898 skrivar Peter Alberg í síni dagbók: "Ankom Postdampskibet Vesta, Kapt. Corfitzon, her til fra Island for at afgaa til København. Som passagerer af Færinger kom Tømmermændende Óli Mortensen, Hans Chr. Andreassen og Magnus Jacobsen, der har været oppe i Reykjavík til at bygge et Hospital for Spedalske.

Hann leggur afturat, at Óli var biðin um at koma til Íslands til hetta arbeiðið. Hetta sigur eisini nakað um, at virðingin fyri Óla rakk heilt til Íslands.

### Virkin í fráhaldsrørsluni.

Eitt økið, har Óli var serliga virkin, var í gamla avhaldsfelagnum í Havn. Hetta verður best lýst við teimum minningarorðum, sum vóru í Dúgvuni, blaðnum hjá avhaldsfelagnum, tá ið Óli doyði 1920.

Fyrst verður endurgivin grein sum Andras Samuelsen hevði í Dimmalætting:

"Jeg har kendt Ole Mortensen i over et kvart Aarhundrede. Som ungt Menneske lærte jeg ham at kende i Thorshavn Afholdsforening. Alle havde vi i Afholdsforeningen den største Respekt for Manden. Han var alvorlig og Elskværdig mod os yngre, som sluttede sig til den Forening, han havde været med til at bygge og som støttede den Sag, der stod hans Hjerte nær – Afholdssagen. Han var faamælt men ingen var nogen sinde i Tvivl om hans Stilling til de forskellige Spørgsmaal der opstod i Aholdsforeningen. Han var en af Afholdsagens støtteste Venner og Forkæmpere, og Afholdssagen har ved hans Død lidt et Tab af væsentlig Betydning.

Han var en trofast Afholdsmand, trofast som Ven og trofast som Meningsfælle. Han var en Pryd for den færøske Haandværkerstand, arbejdssom dygtig og flittig som han var.

Han var en god Borger for Thorshavn By og han var en god Færing af den gamle Skole. Alle vi som kendt ham vil savne ham og alle er vi enige om at holde hans minde i Ære.

### Síðan verður hildið fram:

Thorshavns Total Afholdsforening har for nylig mistet et af sine ældste og mest interesserede Medlemmer, idet den kendte Afholdsmand, Tømrermester Ole Mortensen, afgik ved Døden den 30. Maj efter nogen Tids Sygeleje, 69 Aar gammel.

Ole Mortensen meldte sig ind i Afholdsforeningen den 12. Januar 1879 og har lige til sin Død været uafbrudt Medlem. Inden for Foreningen har Ole Mortensen i Tidens Løb beklædt forskellige Tillidshverv. Han var saaledes i en lang Aarerække Bestyrelsesmedlem og fra 1. Januar til 31. December 1913 Formand, hvilket Hverv han paa grund af svækket Helbred maatte bede sig fritaget for.

Afholdsforeningen viste Ole Mortensen sin Tak og Paaskønnelse for hans uegennyttige Arbejde for Afholdssagen ved at udnævne ham til Æresmedlem.

Ole Mortensen var et ualmindeligt elskværdig og brav Mand, og han havde Mange Venner ikke alene her i Thorshavn men ogsaa ude paa Bygderne.

Her kann verða skoytt upp í, at Óli var eitt av teimum álitisfólkum í fráhaldsfeløgunum, sum í 1907 alment heitti á fólk um at atkvøða fyri at steðga fríari sølu av rúsdrekka á fólkaatkvøðuni um hetta mál. Hetta gekk sum kunnugt væl, og bannið varð samtykt við stórum meiriluta.

Tað kann eisini vera nevnt, at Óli í fleiri umførum var limur í kommunustýrinum í Havn.
Ein slíkur maður er verdur at minnast.
Johanna doyði í 1930, 77 ára gomul og varð tann 17. januar jarðað undir liðini á manninum.




***POULINE POULSEN***
***F. 25.2 1892***
***D. 11.6 1918***
***HVIL I FRED***

## POULINE POULSEN, VESTMANNA

*Hin grøvin í hesi grein er hjá Pouline Poulsen úr Vestmanna.*
*Hetta er ein syrgilig søga um eitt hús í Vestmanna, har foreldur og børn doyðu á ungum árum.*

Frederik Poulsen, abbi Pouline, var føddur í Sandavági í 1826. Foreldur hansara vóru Poul Hansen, kallaður Pól á Mýrini og Rakel Djonedatter, kallað Djóna Rakul, bæði úr Sandavági.

Frederik man hava verið navnframari enn fólk flest, tá á døgum, tá ið hann gjørdist lærari fyri handan vatn, t.v.s. í Sørvági, Bø og Gásadali. Har var hann lærari frá 1846 til 1854. Tá varð skúlin niðurlagdur, men tá ið Føroya Læraraskúli varð settur á stovn í 1870 var Fredrik ein av teimum 12 næminginum, sum vóru í fyrsta flokki í hesum skúla. Hann var tá 44 ára gamal og giftur, og av teirri orsøk gekk hann bert tríggjar mánaðir í skúla og varð so settur sum lærari í Vestmanna uttan at hava tikið læraraprógv. Hann var ein av 12 lærarum, sum inntil 1976 hevur verið lærari uttan læraraprógv, millum hesar vóru vágamenninir Mikkjal á Ryggi og Rasmus á Háskúlanum.

Kona hansara var úr Gásadali og æt Elsebeth Sofie Jacobine f. Joensen.

Fredrik fekk onga langa ævi, hann doyði 7. november 1875, bara 48 ára gamal, og konan doyði 12. desember 1893, 60 ára gomul.

Ein sonur teirra var Joen Poulsen, vanliga kallaður Skúla Jógvan. Hann var føddur í Gásadali í 1853, hann doyði í Vestmanna í 1903.

Kona hansara var Johanne Sybille Jacobsen f. 1852, og hon doyði í 1902 í Vestmanna.

Tey fingu fýra børn. Í hvussu er trý teirra doyðu ung.

Elst var Maren Frederikke Jacobine, sum var fødd í 1885 og doyði í 1899, bara 14 ára gomul.

Næstur var Fredrik Johannes Elias Anton, føddur 24.6. 1888 og doyptur 8. juli sama ár í Vestmanna Kirkju. Tað einasta vit vita um hann er, at hann var hjá foreldrunum í 1901. Tá hvørvur hann úr fólkateljingini og søguni. Hann kann vera farin av landinum, men eingin veit.

Triðja barnið Johanne Pauline Elisabeth, sum var fødd í 1892 og doyði í 1918, 26 ára gomul. Hon hevur verið á Sanatorinum. Tá var langt frá Havn til Vestmanna, so hon er jarðað í kirkjugarðinum á Svínaryggi í Havn, har hon hevur ein vakran gravstein. Tað er ein spurningur, hvør ið hevur reist hann, tí tá var eingin eftir av teimum nærmastu. Men onkur hevur so verið, sum hevur hugsað um hana.

Í oktober 1894 fáa tey aftur eina gentu, Inge Margrethe Elisabeth Fransisca, men hon doyr longu í mars 1895, ikki hálvt ára gomul.

Hetta var lagnan hjá mongum húsum, har tað ikki blivu nakrir eftirkomarar. Tí verður teirra søga so endaleys. Men Pouline "livir" enn á Svínaryggi.

**Komandi partur**

*Komandi partur verður um Jacobsens Plads í danska býnum Troense. Zacharias Thorvald Jacobsen var av Húsum í Havn og bleiv kendur skipssmiðjustjóri í heimbýnum.*